# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Svartkalvi. Túrur nr. 1926.
# Tíðarskeið: 12/6-19/6 - 2019.

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Pedersen, Jens Arni Thomassen og Lise H. Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise H. Ofstad (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru tiknir av svartkalva, trantkongafiski, toski, longu, blálongu, brosmu og havtasku.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Vágshurðar. Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar. Miniloggarar vórðu nýttir til at máta sjóvarhita í trolinum.

**Um túrin:** Fóru av Havnini mikukvøldið 12/6-19 kl. 22:00 og byrjaðu at royna í kantinum eystanfyri og norðureftir. Tað bleiv mest royndt í kantinum eystanfyri, serliga nærhendis kaðalinum, sum er eystan fyri Suðuroyarbanka (Mynd 1). Eitt legg bleiv gjørd suður á endan á Munkagrunninum. Vóru á Havnini eftir loknan túr mikudagin 19/6-19 kl. 7 og landaðu á Bacalao. Tilsamans 17 hál vórðu góðkend og gjørd upp. Veðrið var ringt tveir teir fyrstu dagarnar. Restina av túrinum var tað gott.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), og havtasku (bústig 1-5, egin).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 19. juni 2019.

**Fyribilsúrslit:** 29 ymisk fiskasløg vórðu skrásett (Talva 1). Um nøgdin í kg per troltíma verður samanborin við hini árini, so er nøgdin av svartkalva nakað undir miðal (Mynd 2). Fleiri magar vórðu kannaðir á túrinum. Føðin hjá svartkalva var í høvuðsheitum svartkjaftur, meðan tað kom fyri, at onkur einstakur svartkalvi hevði etið sild. Svartkjaftur var eisini høvuðsføðin hjá toski, blálongu og brosmu.

**Viðmerkingar:** 200 íleguprøvar av trantkongafiski vórðu tiknir til eina verkætlan. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1926.

**Talva 1**. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 9319.801 | 340 | 145 | 17 |
| TRANTKONGAFISKUR | 2362.493 | 200 | 13 | 17 |
| TINDASKØTA | 430.104 | | | 17 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 324.706 | | | 15 |
| HALAHVASSA SKØTA | 262.250 | | | 9 |
| TOSKUR | 256.195 | 12 | 11 | 8 |
| BLÁLONGA | 192.204 | 53 | 29 | 10 |
| BROSMA | 157.674 | 60 | 9 | 16 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 70.989 | | | 3 |
| BLÁGÓMUR | 65.976 | | | 5 |
| LÁLLA | 59.784 | | | 15 |
| ÍSHAVSSKØTA | 56.326 | | | 3 |
| SVARTKJAFTUR | 54.011 | | | 15 |
| LONGA | 48.240 | 6 | 1 | 5 |
| HVÍTASKØTA | 39.075 | | | 2 |
| UPSI | 21.090 | | | 5 |
| KLINGRUSKØTA | 14.034 | | | 11 |
| HAVTASKA | 8.845 | 1 | 1 | 1 |
| HVASSASPREK | 6.996 | | | 7 |
| GULLLAKSUR | 6.926 | | | 4 |
| HÝSA | 3.075 | | | 1 |
| ÚLVFISKUR | 2.965 | | | 4 |
| STEINBÍTUR | 2.960 | | | 1 |
| LÝSINGUR | 2.731 | | | 1 |
| HAVMÚS | 1.730 | | | 1 |
| ROGNKELSI | 1.533 | | | 1 |
| KRYTTLINGUR | 1.208 | | | 1 |
| LÍTLABROSMA | 0.955 | | | 1 |
| SILD | 0.475 | | | 2 |
| RÆKJA PANDALIDAE | 0.022 | | | 1 |
| YMIST(ostur, skrambul v.m) | 10.786 | | | |
| Tilsamans | 13786.159 | 672 | 209 | |




**Mynd 2.** Veiða av svartkalva (kg per troltíma) í tíðarskeiðnum 1995-2019. Stiplaða linjan er miðal fyri alt tíðarskeiðið. Í 2010 var bert 1 hál tikið og úrslitið er tí ikki víst. Í 2016 vóru bert 8 hál tikin.

<u>Lise H. Ofstad</u>